# Kursivirðið kann eksplodera

**Virðið á partabrøvunum hjá Atlantic Petroleum kann væl vera nærum tvífalt av tí, sum felagið í dag er skrásett til. Tað er niðurstøðan hjá Eik Bank Danmark, ið er dóttirfelag hjá Føroya Sparikassa. Bankin hevur sum teir fyrstu gjørt eina veruliga analysu av partabrævinum**

PARTABRØV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani Atlantic Petroleum í mai mánaði í fjør varð skrásett á íslendska virðisbrævamarknaðinum, eru ognirnar hjá partaeigarunum øktar munandi í virði.

Sum tað framgongur av hjáløgdu talvu, so er kursvirðið á partabrævinum nú komið upp á 453. Hetta skal siggjast í mun til kursin á 314, sum var galdandi, tá felagið var skrásett. Og í mun til kurs 265, sum var galdandi, tá felagið fyri góðum ári síðani framdi seinastu partapeningshækkanina.




*Myndin vísur gongdina í prísinum og umsetningi á Atlantic Petroleum partabrøvum síðan byrjan 15/6-05*

*kelda: www.vmf.fo & www.icex.fo*

### »Rætta« virðið er tvífalt

Men sambært analysuni hjá Eik Bank, so er veruliga virðið á partabrævinum nakað nógv meira vert.

Í greiningini verður víst á, at oljuprísurin hevur verið støðugt hækkandi seinastu tíðina. Samstundis hava bretar gjørt stór oljufund nærhendis føroyska markinum, og hetta vil alt annað líka gera føroyska oljufelagið meira áhugavert. Eisini verður mett, at Atlantic Petroleum hevur eitt sera gott útgangsstøði á føroyska økinum sammett við fleiri av kappingarneytunum. Serstakliga tá talan gerst um at finna góðar samstarvsfelagar. Og hartil verður ikki mett, at menningarloyvini, sum AP eigur, veruliga endurspeglað aktuella partabrævakursinum, verður millum annað sagt í analysuni.

Hetta er nakrar av høvuðsgrundgevingunum í niðurstøðuni, sum Eik Bank hevur gjørt, men fyri verandi og komandi íleggjarar er endaliga niðurstøðan í tølum helst tann mest áhugaverda.

Og her er greriða viðmælið hjá bankanum, at tað nú ræður um at keypa partabrøv í felagnum. Tá greiningin varð gjørd, var kursurin á AP-partabrævinum 412. Hann er í dag komin upp á 452 - helst eisini ávirkaður av greiningini. Men vøksturin steðgar ikki her, sambært greiningini. Sonevndi »fair kursurin«, altso eitt rímiligt virði, verður mett til 884, og tað munnu vera søtir tónar í oyrunum hjá íleggjarunum. Ikki minst, tá sagt verður, at hetta er »upp á stutt sikt« – altso innan eitt ár ella so.

At hetta so ikki er hent, verður partvíst tengt at tí veruleikanum, at talan er um fyrsta leitingarfelag, sum er skrásett í Íslandi. Tað vil siga, at marknaðurin av íleggjarum ikki hevur eins góðan kunnleika til slík feløg, sum eitt nú íleggjarar í London hava. Og hóast forvitni, so kann hetta sjálvandi eisini elva til varsemi.

### Renta: 234%

Bankin mælir íleggjarum til at keypa partabrævið, men ávarar samstundis ímóti, at talan er um eina vágafulla íløgur.

Tó at íløguvágin í oljuleitingarfeløg altíð verður mettur sum stórur, so er lítið at ivast í, at tíðindini fara at draga hópin av íleggjarum móti føroyska partabrævinum. Verður tosað um ein møguligan kursvinning upp ímóti teimum 100, so er talan nærum um jackpot á partabrævamarknaðinum, og tí verður partabrævið ein sera áhugaverdur partur av porteføljanum hjá íleggjarum – eisini stórum íleggjarum.

Og fyri tey, sum longu seinasta vetur keyptu sær partabræv, man hetta ikki vera minni áhugavert. Kursurin var tá 265, og heldur metingin hjá Eik Bank Danmark, so verður altso talan um kursvinning, sum er heili 234%, og tað er nakað væl meira, enn íløgur í miðal kasta av sær.



## Lærlingur til Auto Service

**Vit søkja eftir einum lærlingi til eykalutagoymsluna at byrja skjótast gjørligt.**

**Auto Service leggur stóran dent á tænastuna, og tí vænta vit, at tú ert álitisvekjandi, samvitskufullur og fyrikomandi. Afturfyri kunnu vit bjóða tær góðar umstøður á einum arbeiðsplássi, har áherðsla verður løgd á trivnaðin.**

**Tað er eitt krav, at tú hevur koyrikort og FHS prógv.**

**Útbúgvingin fer partvíst fram í Føroyum og í Danmark, og tí skal liggja fyri at vera burturstaddur nøkur tíðarbil.**

**Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú seta teg í samband við Jan Hentze, teldupost jan@autoservice.fo ella telefon 345415.**

**Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 16. januar 2006. Send umsóknina til Auto Service, undir Krákugjógv 19, postboks 3171, 110 Tórshavn.**

**p/f Auto Service**





## Flogternur og flogtænarar til Atlantic Airways

Talan er um eitt spennandi og krevjandi arbeiði, har tú varðar av trygdini og tænastuni umborð.

**Starvið**
Felagið leggur stóran dent á, at ferðafólkini fáa eina góða og persónliga tænastu. Tað er tín uppgáva at fáa okkara kundar at kenna seg væl umborð, at hava ábyrgd av trygdini hjá ferðafólkunum og at meta um ynski og tørv teirra.

Tú skalt rokna við at arbeiða skeivar tíðir, onkuntíð uttanlands, ofta undir tíðartrýsti og við strongum arbeiðskrøvum. Tú dugir fyrstuhjálp og megnar at handfara hættisligar støður.

Umframt at tosa føroyskt skalt tú kunna samskifta á onkrum skandinaviskum máli og enskum.

Loftferðslumyndugleikarnir SLV krevja, at tú ert fylt/ur 20 ár, hevur góða hoyrn og góð eygu, umframt eina lýtaleysa revsiváttan. Harafturat krevst, at tú dugir at svimja og gjøgnumførir eitt skeið hjá Atlantic Airways. Heilsukanning fer fram hjá SLV-góðkendum floglækna, áðrenn loyvisbræv til flúgving verður givið.

**Persónligir eginleikar**
Vit rokna við, at tú ert kropsliga og sálarliga væl fyri. Tú mást hava eitt ljóst sinnalag, vera ágrýtin og bera teg róliga at í strongdari støðu. Vit leggja eisini stóran dent á samstarvseginleikar, trúskap og reiðiligheit.

Ljóðar hetta sum tú, kanst tú innan 23. januar 2006 senda eina skrivliga umsókn við mynd til Atlantic Airways, 380 Sørvágur, att. Bergtóra Nielsen.

Fyrispurningar kunnu setast Bergtóru Nielsen á tlf 21 32 91 ella e-mail bergtora@atlantic.fo

www.sansir.fo

ATLANTIC AIRWAYS

www.flyfaroe.com